Fíggjarlógin 2004:

# Hall á 396 mio. krónur

**Framskrivingar og inntøkumetingarnar fyri 2004 vísa eitt hall á góðar 396 mio. krónur á Fíggjarlógini. Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Bárður Nielsen, hevði ikki væntað, at útlitini vóru so døpur. Fyrrverandi Fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, heldur, at fíggjarpolitikkurin hjá ABC-samgonguni er ábyrgdarleysur**

HALL Á FÍGGJARLÓGINI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Búskaparligu útlitini fyri 2004 eru alt annað enn bjørt. Við støði í Fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 siga nýggjastu framskrivingarnar og inntøkumetingarnar, at Fíggjarlógin fyri 2004 fer at vísa eitt hall á góðar 396. mio. krónur.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2004 hjá Karsteni Hansen og undanfarnu samgongu var mett at geva 100 mio. krónur í yvirskoti. Metingin í februar 2004 stendur als ikki í mát við metingina hjá undanfarnu samgongu í heyst.

Sambært nýggjastu metingini hevur undanfarna samgonga forroknað seg við slakari hálvari milliard. Her skal kortini leggjast afturat, at politisku tiltøkini hjá undanfarnu samgongu eru ikki roknað við.

### Verri enn væntað

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Bárður Nielsen, hevði ikki væntað at útlitini vóru so døpur. Hann hevði bæði vónað og væntað, at betur stóð til í føroyska búskapinum

Í farnu viku førdi Bárður Nielsen fram, at hann ætlaði ikki at tátta í búskaparliga, hóast búskaparliga niðurgongdin er veruleiki. Grundgevingin var, at táttar tað almenna brádliga í búskaparliga, kann støðan gerast ilt verri.

Stóra hallið á fíggjarlógini fær Bárð Nielsen at umhugsa støðuna.

– Vit hava í løtuni ikki gjaldførið til so stórt hall og tí verið eg noyddur at umhugsa at gera nøkur tiltøk. Til landsstýrisfundin hósdagin skal hvør landsstýrismaður útgreina sítt málsøki og síðan verður avgjørt, hvørji tiltøk skulu fremjast, sigur Bárður Nielsen.

### Ábyrgdarleyst

Fyrrverandi Fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, heldur fíggjarpolitikkurin hjá nýggju ABC-samgonguni er ábyrgdarleysur. Hann rør framm undir, at uttan at gera nøkur tiltøk og bert at framskriva tølini, gevur fíggjarlógin sjálvsagt hall.

– Skal mann bert lata standa til, er ikki neyðugt við nøkrum fíggjarmálaráðharra, tí so kann mann bara hava eina teldu at framskriva tølini. Droppa vit at gera intriv, ja so sjálvsagt endar tað galið, tá inntøkurnar minka, sigur hann

Karsten Hansen leggur afturat, at fakkunnleikin hevur fleiri ferðir ført fram, at føroyski búskapurin er sterkur við røttu stýringini og tí er ikki rætt at mála ræðumyndir av føroyska búskapinum.

## Tjaldrið kemur aftur síðst í vikuni

**Verjuskipið Tjaldrið hevur verið uttanlands á skipasmiðju í ein góðan mánað**

VAKTARTÆNASTA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Gongur sum ætlað, fer vaktarskipið Tjaldrið, aftur í sigling síðst í vikuni.

Tjaldrið hevur í meiri enn ein mánaða verið á Skipasmiðju í Skagen.

Á Skipasmiðjuni hevur høvuðsarbeiðið verið at sandblása skipið.

Og nú tað er farið í dokk, eru eisini aðrar ábøtur gjørdar, men leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum, Elmar Højgaard, sigur, at hetta eru bara smáttarí.

Mong eru tey, sum halda, at almennir stovnar eiga fyrst og fremst at hugsa um føroyskt vinnulív, tá ið arbeiði skulu gerast.

Men Elmar Højgaard sigur, at so umfatandi sandblásing, sum talan her er um, verður ikki gjørd í Føroyum.

Og hini arbeiðini, sum skuldu gerast vóru bara piparnøtur, sum hann tekur til.

Annars hevur Vaktar og Bjargingartænastan ikki bjóðað síni arbeiði út uttanlands, sum tað sum er at gera við skipini, hevur altíð verið gjørt í Føroyum.

– So hetta er heilt avgjørt eitt undantak, sigur leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum.



*Tjaldrið hevur nú verið burtur í ein góðan mánaða, men væntandi fer vaktarskipið aftur í sigling síðst í vikuni*

## Simprentis bjóðar skeið í Føroyum



*Tríggir saudi-arabarar, ið læra um oljuleiting á skeiði hjá Simprentis í* Aberdeen

**Føroyska felagið Simprentis fer nú rættiliga undir virksemi sítt. Oljuskeið eru í Aberdeen og London hendan mánaðin, og 4. mars verður fyrsta skeiðið fyri almenninginum í Føroyum**

OLJUVINNA
*Jan Müller*

Vit hava fyrr skrivað um Simprentis, sum ger og veitir skeið í millum øðrum leiting eftir olju. Skeiðini eru sermerkt á tann hátt, at luttakararnir læra við at taka avgerðir í einum hugsaðum veruleika. Grundhugsanin er, at tú lærir betur, tá tú virkin tekur avgerðir – heldur enn bara at sita afturá og móttaka upplýsingar.

Hetta er ein undirvísingarháttur, sum vinnur frama uttanlands, og skeiðini frá Simprentis hava vakt stóran áhuga bæði í Noregi og Bretlandi.

– Fólk eru troytt av skeiðum, har lítið annað hendir enn at upplýsingarnar fara inn gjøgnum annað oyrað og útaftur gjøgnum hitt. Virkin undirvísing krevur nakað av luttakarunum, og tað vísir seg at virka, sigur Ólavur Ellefsen frá Simprentis.

Skeiðið er fyri øll, sum vilja vita, hvat virksemi er tengt at oljuleiting, og hvat oljufeløgini í veruleikanum brúka peningin til í sambandi við leiting eftir olju.

Framvegis eru stórir møguleikar í oljuleiting í Føroyum, hóast tað sýnist trekt at finna olju í rakstrarverdum nøgdum. Til dømis kann nevnast, at samlaði kostnaðurin av teimum 4 brunnunum, ið oljufeløgini hava bundið seg til at bora í Føroyum í 2005 og 2006, liggur millum 600 og 800 mió kr, sum í størst møguligan mun skulu nýtast í Føroyum.

Pláss verður fyri í mesta lagi 24 luttakarum á fyrsta føroyska skeiðinum, sum verður í Havnini 4. mars. Meira fæst at vita á heimasíðuni www.simprentis.com



# Ógreitt útspæl

**Tað koma ov nógvar og ógreiðar útmeldingar frá samngongufólki um skattalættauppskotið, heldur formaðurin í Starvsmanafelagnum**

SKATALÆTTI
*Edvard Joensen*



*Gunnleivur Dalsgaarð, millum Bárð Nielsen, landsstýrismann, og Petur Alberg Lamhauge, aðalstjóra í Fíggjarmálaráðnum, metir, at tað eru ov nógvar óneyvar útmeldingar í skattalættauppskotinum hjá landsstýrismanninum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fíggjarmálaráðið:** Uppskotið um skattalætta hjá landsstýrismanninum við fíggjarmálum er ov ógreitt. Har eru ov nógvar ymiskar útmeldingar, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum.

Hann var teirra millum, sum landsstýrismaðurin hevði stevnt til fundar í Fíggjarmálaráðnum fríggjadagin í seinastu viku.

Starvsmannaformaðurin metir ikki, at nakað nýtt kom fram á tí fundinum. Har fekst einki at vita, sum hann ikki visti undan fundinum, sigur Gunnleivur Dalsgarð. Tað tykjast vera nógvir leysir endar enn fyri at fáa politisku kabalina at ganga upp, heldur hann.

Hann sigur um uppskotið um skattalætta, sum fyriliggur, at tað fer at geva fleiri av limum Starvsmannafelagsins ein hampiligan skattalætta. Men tað vera eisini limir í felagnum, sum ikki fáa nakað serligt burturúr.

Hann metir, at uppskotið fer at verða broytt nakað, áðrenn tað verður lagt fyri tingið, so hann hevur hug at bíða eitt sindur enn, áðrenn hann vil geva tí nakran endaliga dóm.

Hann metir fundin á Argjum fríggjadagin sum eina roynd at kyrra fakfeløgini heldur enn nakran upplýsandi fund, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum heldur, at landsstýrismaðurin eigur at vera eitt sindur varin við skattalætta, um einki er at seta í staðin.

Landsstýrismaðurin segði á fundinum í Fíggjarmálarаráðnum, at peningurin liggur best í lummanum hjá borgaranum, tí tá fer hann í stóran mun í umfar sum vaksandi virksemi í samfelagnum og kemur soleiðis aftur til landskassan.

– Tað kann ljóða skilagott at siga so, heldur formaðurin í Starvsmannafleagnum, men vísir í sama andadrátti á, at um tað ikki hendir, so er galið.

Skatturin er grundarlagið undir vælferðini, sigur Gunnleivur Dalsgarð. Og verður skattainntøkan burtur, fer tað heilt greitt at ganga út yvir vælferðina. Og so verða tað fleiri, sum kenna sviðan heldur enn ágóðan av skattalættanum, metir hann.

Á fundinum í Fíggjarmálaráðnum hevði Gunnleivur Dalsgarð hvassliga at landsstýrismanninum, Bárði Nielsen, tá hesin fanst at pressuni fyri at hava vavt málið um skattalætta í ein ellibita, soleiðis at fólk púra hava misskilt tað.

Gunnleivr Dalsgarð metti hinvegin, at pressan júst hevði gjørt sítt arbeiði til lítar við at vísa á teir veikleikar, sum eru í uppskotinum.

# Uppskotið er ein skandala

**Uppskotið um skattalætta er ein skandala, sum bara fer at breiðka gjónna millum tey lágløntu og restina av samfelagnum, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag**

SKATTALÆTTI
*Edvard Joensen*



*Hans Joensen, í miðjuni, kallar skattalættauppskotið fyri skandalu, rossahandil og provokatión móti teimum lágløntu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fíggjarmálaráðið:** –Uppskotið um skattalætta er ein skandala. Tað fer at breiðka gjónna millum okkara limir og restina av samfelagnum. Vit kunnu yvirhøvur ikki góðtaka tað, sigur formaðurin í Havnar Arbeðsmannafelag, Hans Joensen.

Hann er sannførdur um, at talan er um rossahandil fyri at fáa kapitalistarnar at taka undir við Samhaldsfasta, sigur hann. Hann metir tað reint út sagt forkastiligt at tengja hesi bæði málini saman.

– Hatta er gjørt fyri at fáa fólk, sum fáa skattalætta upp á 22.000,- krónur, at gjalda 1.000,- krónur inn aftur i Hin Samhaldsfasta, sigur Hans Joensen.

Hann dylur ikki fyri, at hann er ógvuliga misnøgdur við tað uppskotið, sum fyriliggur.

– Tað fer ikki at geva nakað til tær inntøkurnar, okkara felag umboðar, sigur hann. Hinvegin fara tey, sum frammanundan hava tað rúmligt, at fáa meira.

Hann sigur, at tða tosað verður um at fáa fólk at arbeiða meira, eiga samstundis at verða settar nógv greiðari reglur fyri, hvat hugtakið »tær seinast vunnu krónurnar« er.

Tað eigur heilt greitt at vera víst til yvirtíðararbeiði, sigur Hans Joensen. Tað, sum liggur oman fyri sáttmálabundnu lønina. Og ikki bara eitt tal, sum tann, ið hevur stóra inntøku, kortini fær uttan at arbeiða fleiri tímar.

– Tað er lætt nokk at sita á síni fløtu reyv og fáa oman fyri 300.000,- krónur í inntøku og 22.000,- krónur í skattlætta. Tá tímir tú ikki at arbeiða eyka. So hatta argumentið heldur ikki, sigur hann.

Soleiðs sum hetta nú er sett upp, kann landsstýrismaðurin gott gloyma alt tos um lønarsteðg í framtíðini, sigur Hans Joensen. Tvørtur í móti fer hetta bara at elva til nógv størri lønarkrøv, og tí ið harvið fylgir, í framtíðini.

Hetta er ein beinleiðis provokatión, og tað verður ikki talan um, at vit fara at halda aftur í okara krøvum, verður hetta gjøgnumført. Vit gloyma hetta ikki, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag.

## Evnisdagur um økisferðavinnu

**Fríggjadagin 20. februar skipar Ferðaráð Føroya fyri evnisdegi um økisferðavinnu í Føroyum. Tiltakið er ikki alment**

FERÐAVINNA

Ferðaráð Føroya fer at skipa fyri evnisdegi um økisferðavinnu. Dagurin er ætlaður fólki í ferðavinnuni, og fara umboð fyri kunningarstovurnar kring landið at umrøða støðu og framtíðarútlit hjá føroysku ferðavinnuni, sigur Ferðaráðið í tíðindaskrivi.

Tosað fer at verða um ymisk evni sum eitt nú útjaðaraferðavinnu, marknaðarføring, og umhvørvi og náttúru.

Stjórin í Ferðaráðnum, Heri Niclasen, fer at hava innlegg, sum grundað er á innkomin uppskot frá seinasta ferðavinnudegi.

Eisini fer at verða tosað um verkætlanina »Destination Viking, Sagas & storytelling« og innlendismenning sum heild, sigur Ferðaráðið í tíðindaskrivinum.

Framløgufólk verða Birita Nolsø frá Ferðaráðnum, og Regin Debes frá Føroya Fornminnissavni.

Tey, ið vilja frætta nærri um tiltakið, kunnu venda sær til Ferðaráðið ella kunningarstovurnar kring landið.

**ej**